# Ása og Durita eru lekrast

Enn tveir finalistar eru nú funnir til kappingina um, hvør er tann lekrasta í Sunset-kappingini í hondbólti. Í gjár skuldu lurtararnr hjá Pink á Rás 2 atkvøða um, hvørjar lekrastu kvinnurnar eru hjá Neistanum og Stjørnuni. Og har gjørdust tað Ása á Neystabø og Durita Christophersen, sum gjørdust vinnarar. Soleiðis eru tær báðar saman við Randi S. Wardum úr Kyndli og Ninnu K. Johansen úr Stjørnuni í finaluni. Seinastu tveir finalistarnir verða funnir komandi mikudag, tá atkvøðast skal millum spælararnar hjá VÍF og VB. Lekrasti spælarin í Sunset-kappingini fær klipp og liting frá Salon McGavin í Havn, umframt gávukort á 2.000 krónur frá mótahandlinum, Diva.



# Edvardsen til Neistan

Neistin, sum fyri stuttum gjørdist føroyameistari í manshondbólti, hevur styrkt sær um hópin, nú felagið ætlar at taka lut í Europa-Cup kappingini í hondbólti. Neistin hevur gjørt avtalu við David Edvardsen úr StÍF. David Edvardsen kom til StÍF í fjør, at var hann ein týðandi partur av liðnum, sum vann silvur í bæði lands- og steypakapping. Eisini hevur Neistin gjørt avtalu við Jakob Jónsson, sum í farna kappingarári var venjari hjá kvinnuliðnum. Hann verður komandi kappingarár hjálparvenjari hjá mansliðnum.

# Fýra vikur til Inga



*Sjálvur var Ingi Højsted bangin fyri, at hann aftur skuldi enda í einum skaðahelviti*

**Talan var ikki um so álvarsligan skaða, sum Ingi Højsted sjálvur bar ótta fyri, tá hann noyddist av vøllinum í farnu viku**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Eg var sjálvur bangin fyri, at talan aftur var um krossbandsskaða, og eg sá fyri mær, at nú skuldi aftur ganga eitt ár ella so, uttan at eg kundi spæla.

Soleiðis sigur Ingi Højsted, um skaðan, sum hann fekk, tá B36 fyri viku síðani spældi fjórðingsfinalu móti 07 Vestur í kappingini um Løgmanssteypið.

Heilt so álvarsligt var tað tó ikki.

- Eg var aftur hjá lækna mánadagin, og har vóru boðini hampuliga positiv. Talan er ikki um krossella liðbandsskaða, men líkt er til, at talan er um lítlan skaða, har liðbondini í knænum eru fest.

- Eg skal so aftur í skannaran eina ferð afturat, soleiðis at alt kann staðfestast við vissu. Men sum tað sær út nú, so er líkt til, at eg skal halda steðg í einar fýra vikur ella so.

# Broytingar í B36

**Enn er spæliloyvið hjá nýggja nigerianska áleyparanum ikki komið í rættlag. Og sum skilst er tað upp á tal, at annar av nýggju ungverjunum fer av landinum aftur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Úr Runavík verður sagt, at dysturin í kvøld væl kann verða ein av teimum heilt týdningarmiklu hetta kappingarárið*

B36 og NSÍ spæla í kvøld framskundaða uppgerð í Formula-deildini.

B36 verður av fleiri mett sum liðið, ið er viknað mest í vetur, men Óli Hansen hjá NSÍ metir kortini, at talan er um eina av teimum heilt truplu uppgávunum.

- Enn taka vit ein dyst í senn, sigur Óli Hansen við einum skeivum smíli.

- Men tað er einki at ivast í, at vit síggja hetta sum eina av teimum heilt truplu uppgávunum. Á útivølli móti B36 hevur talan aloftast verið um sera tættar dystir hjá okkum, og tí hevur ein møguligur sigur stóran týdning fyri okkum, sigur Óli Hansen.

NSÍ hevur allar mans tøkar til uppgávuna í dag.

Hjá B36 er Ingi Højsted ikki við, nú hann er skaddur. Hinvegin høvdu teir í árstalsfelagnum vónað, at spæliloyvið hjá nýggja nigerianska áleyparanum var komið í rættlag, men hann verður so ikki tøkur í kvøld. Og talan verður kanska samstundis um seinasta dystin hjá Tamas Nagy. Hann kom til B36 í vetur, men sum skilst, so er hann ikki longur partur av framtíðarætlanunum hjá felagnum.

# Klæði til Knørr í trý ár

**Sportmaster í Havn og Róðrarfelagið Knørrur hava gjørt avtalu um, Sportmaster komandi trý árini er klædnastuðul hjá kappróðrarfelagnum**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*John Thomsen fyri Sportmaster og Magnus Gaard, formaður í Knørri, fegnast um avtaluna, sum nú er undirskrivað*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Talan er um fyrstu sponsoravtaluna, sum Sportmaster hevur gjørt við kappróðrarfelag. Og í kappróðrarfelagnum fegnast tey um avtaluna.

- Tað ger sjálvandi tað, at vit koma at hava ein sterkari felags samleika. Nú verður tað so, at allar manningarnar hava sama búna, og tað ger, at vit í størri mun tykjast sum ein eind úteftir, sigur Sjúrður Gullbein, sum er skrivari í felagnum.

- Og so eru vit sjálvandi ikki øðrvísi enn so nógv onnur feløg. Tað, at vit nú hava gjørt klædnaavtalu fyri næstu trý árini, ger sjálvandi eisini, at vit í felagnum hava tann partin minni at hugsa um. Og alt annað líka ger tað jú eisini raksturin av felagnum lættari, sigur Sjúrður Gullbein.

# Barca stríddi seg víðari

**Uttan Ronaldinho, Messi og Deco eydnaðist í gjár Barcelona at vinna 1-0 á Schalke 04**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan varð tó um ein sigur, ið langt ífrá var somikið sannførandi, sum catalansku viðhaldsfólkini annars høvdu vónað.

Schalke tapti heimadystin 1-0, og gjøgnum dystin á Camp Nou royndu teir støðugt at javna hendan munin. Fleiri ferðir var vandin eisini heilt stórur framman fyri málið hjá Barcelona, men tað gjørdist bara nær við og næstan hjá Kuranyi, Asamoah og hinum í álopinum hjá Schalke.

Einsamalla málið í dystinum gjørdi Gnegeri Yaya Toure beint fyri steðgin. Og eftir hetta var at kalla eingin vegur aftur hjá Schalke.

Í hálvfinaluni skal Barcelona spæla móti Manchester United.

Barcelona-Schalke 04 1-0 (1-0)
(Barcelona víðari við samanlagt 2-0)
1-0: Gnegeri Yaya Toure, 43.